## Nevnd til vælferð

Ein meiriluti í grønlendska Landstinginum samdist í síðstu viku um at skipa eina vælferðarnevnd. Jens-Lars Fleicher, Siumut-tingmaður og borgarstjóri, var ein av teimum ídnastu talsmonnunum fyri at skipa nevndina. Hann sigur við útvarpið í Nuuk, at vælferð og javnstøða hoyra saman. Hann vísir á, at tað er umráðandi, at allir grønlendingar hava somu bústaðar-, arbeiðs-, skúla- og røktarmøguleikar, sama hvar teir búgva.

## Inn á meginøkið

Bókhalds- og roknskaparstovan BKV, sum hevur virkað heima á Sandi seinastu 23 árini, letur í morgin upp skrivstovu í Argjaboðagøtu 7 á Argjum. Ta fyrstu tíðina verður skrivstovan á Argjum opin týsdag og hósdag, men málið er, at hon skal verða opin hvønn gerandisdag. Umframt bókhald og roknskap fæst BKV eisini við ognarmekling, og eitt fólk fer nú at taka sær av hesum virkseminum burturav, sigur fyritøkan.

# Gongur væl at manna størv á Strandferðsluni

**Trý fólk eru sett og trý afturat verða sett í næstum og tey eru øll suðuroyingar**

STARVSSETANIR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosiaulurin.fo*

Tá ið tað varð avgjørt at flyta Strandferðsluna til Suðuroyar, førdi tað til fleiri uppsagnir á stovninum, tí starvsfólk vilja ikki flyta við.

Síðani hava lýsingar eftir starvsfólki til Strandferðsluna javnan verið at sæð í føroyskum fjølmiðlum.

Men tað gongur væl at manna størvini aftur.

Og beint fyri páskir vóru tvey bæði fyrstu størvini sett av nýggjum. Og tað vóru tveir suðuroyingar, sum fingu álitið. Og teir eru báðir úr Hvalba.

Rógvi Thomsen í Hvalba er settur í starv sum nýggjur roknskaparmaður og "kontrollari" og Eyðfinn Debes er settur í starv sum nýggjur lønarumsitari.



*Higartil hava seks fólk sagt upp, síðani avgerð varð tikin um at flyta stovnin til Suðuroyar og tey verða øll mannað aftur við suðuroyingum Rógvi Thomsen í Hvalba er ein av teimum nýggju fólkunum, sum skulu vera við til at leggja lunnar undir eini "nýggjari" Strandferðslu í Suðuroy*

Rógvi Thomsen er 33 ára gamal og útbúgvin úr pengingastovni.

Eyðfinn Debes er 35 ára gamal og býr í Danmark, har hann er útbúgvin á skattmálaráðnum í Danmark, har hann enn arbeiðir.

Eftir ætlan skulu teir báðir byrja í nýggja starvinum 1. mai.

Harafturat er 44 ára gamli, Conrad Gaard Joensen, í Vági settur í starv sum nýggjur skipainspektørur og hann byrjar í starvinum 1. juni.

Hann er maskinmeistari og hevur fleiri ára royndir sum maskinstjóri og hevur verið meistari á Danyard skipasmiðjuni í Danmark

Teir skulu byrja á høvuðssætinum í Havn, men 1. januar flyta teir við suður.

Teir skulu sostatt vera við til at leggja lunnar undir at fáa stovnin at virka væl í Suðuroy og tí skulu teir arbeiða á stovninum í Havn ta fyrstu tíðina, har teir skulu venjast at arbeiða á einum stovni sum Strandferðsluni.

Annars hava trý størv afturat verið lýst leys. Tað eru størvini sum skrivstovufólki til samferðsludeildina, einum skuldarrøktara og einum leiðsluskrivara.

Øll hesi størvini eru lýst leys tvær ferðir, tí ov fáir umsøkjarar vóru. Fyrru ferð vóru bara ein og tvær umsóknir til hvørt starvið, men nú hevur Strandferðslan fýra og fimm umsóknir at velja ímillum til hvørt starvið.

Tó hava tveir umsøkjarar søkt tvey størv og sostatt hevur Strandferðslan 11 fólk at velja ímillum til tey trý størvini, og umsøkjararnir eru javnt býttir ímillum øll trý størvini.

Páll Heinesen, starvsfólkaleiðari á Strandferðsluni, sigur, at umsøkjarar eru skikkaðir, so nú verða størvini sett við onkrum av umsøkjarunum. Miðað verður eftir, at tey skulu byrja 1. juni

Hann váttar eisini, at allir umsøkjarar búgva í Suðuroy.

Sostatt verða øll tey seks nýggju størvini higartil mannað við suðuroyingum.

Higartil eru tað hesi seks fólkini, sum hava sagt upp á Strandferðsluni, síðani tað varð avgjørt at flyta stovnin til Suðuroyar. Nú eru so trý teirra sett aftur og hini trý verða sett um stutta tíð.

# Ferðaætlanin hjá Smyrli kollveltast

**Strandferðslan roynir í løtuni at leggja nýggja ferðaætlan fyri Smyril og har kunnu henda kollveltandi broytingar**

SUÐUROYARSIGLING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal Smyril hava nýggja ferðaætlan.

Tá ið fíggjarlógin varð samtykt, fekk Strandferðslan fimm milliónir eyka, sum skulu brúkast til at økja um túratalið hjá Smyrli.

Í løtuni siglur Smyril 14 ferðir ímillum Suðuroy og Havnina um vikuna, men tað liggur í kortinum at hann nú skal sigla 17 ferðir ímillum. Sostat fær hann tríggjar túrar afturat um vikuna.

Ætlanin er, at hann skal byrja at sigla eftir nýggju ferðaætlanini í næsta mánaði og í løtuni verður arbeitt við at leggja ferðaætlanina.

Eitt uppskot til nýggja ferðaætlan er í løtuni til ummælis hjá ferðavinnu og vinnulívi í Suðuroy.

Og eftir tí, sum skilst, kann talan gerast um rættiliga kollveltandi broytingar.

Higartil hevur tað næstan verið óskrivað lóg, at Smyril skal liggja í Suðuroy um næturnar, so at hann kann sigla norður eftir um morgunin.

Men eftir tí, sum nú liggur í kortunum, kann tað koma upp á tal at hann skal liggja onkra nátt í Havn og sigla til Suðuroyar tíðliga á morgni, so at suðuroyingar ikki altíð skulu noyðast so tíðliga upp.

Eitt hevur verið tosað um, at hetta skal vera galdandi um vikuskiftið, so at børn og vaksin í Suðuroy, sum skulu norðureftir til Ítrótt og annað, ikki altíð skulu upp á hálvari nátt fyri at sleppa við Smyrli.

Men eftir hesum leistinum fer tað so eisini at bera til hjá ymsum veitarum norðanfjørðs at fáa ein langan dag í Suðuroy til arbeiðis, uttan at verða noyddir at gista.

Og tað halda summi er ein fyrimunir, tí sum er, kann tað vera torført at fáa reparatørar av ymsum slagi suður, tí teir skulu næstan altíð gista.

Ein onnur broyting, sum hugsað hevur verið um, fer, at gera umstøðurnar hjá fiskavirkjum í Suðuroy at sleppa av við fisk hósdagar nógv verri, tí Smyril skal sigla fyrr av Tvøroyri.

Men tað er ein broyting, sum Suðuroyingar ikki eru fegnir um.

Men enn er ongin endalig avgerð tikin um, hvussu verður við ferðaætlanini.

# Taka fegin kappingina upp

**Í Tryggingarfelagnum Føroyum taka tey væl ímóti ætlanini at broyta lógina so at kapping fæst á økinum**

KAPPING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í løtuni viðgerð Løgtingið eitt uppskot um at broyta tryggingarlógina.

Ein tann stóra broytingin í hesum verður, at nú skal kapping fáast á økinum.

Higartil hevur tryggingarmarknaðurin verið fullkomiliga afturlatin so at útlendsk tryggingarfeløg eru ikki sloppin at virka í Føroyum og føroysk tryggingarfeløg eru ikki sloppin at tekna tryggingar uttanlands.

Men hetta skal nú broytast so at marknaðurin verður latin upp.

Sostatt skulu útlendsk feløg sleppa at virka í Føroyum og somuleiðis skulu føroysk tryggingarfeløg sleppa at tekna tryggingar uttanlands.

Men hesum stúrir stjórin í Tryggingarfelagnum Føroyum ikki fyri.

- Vit síggja hetta meir sum ein møguleika fyri at økja um okkara virksemi, heldur enn sum eina hóttan um, at útlendskt tryggingarfeløg koma til Føroyar at kappast við okkum, sigur Gunnar í Liða, stjóri í trygginini.

- Vit síggja nýggjar møguleikar í hesum, leggur hann afturat.

Hann sigur, at nú kann Tryggingarfelagið Føroyar eisini tekna tryggingar uttanlands og tað kann geva nýggjar møguleikar at menna felagið.

Og uttanlands eru ymsir møguleikar.

- Ein møguleiki kann vera at tryggja føroysk áhugamál uttanlands. Ein annar møguleiki kann vera at fara í samstarv við eitt útlendskt tryggingarfelag.

- Men talan kann eisini vera um at Tryggingarfelagið Føroyar beinleiðis stovnar deildir ella tryggingarfeløg uttanlands, sigur hann.

Enn vil Gunnar í Liða kortini ikki vera meiri ítøkilig um, hvørjar tankar, teir hava spælt sær við á hesum øki.